





rúmum, rúmd, litum, ljósi, ljóði og rúmi fyri at fáa eitt ávíst upplivilsi og estetiskt úrslit.

**3. Hvat gera arkitektar?**

**Meduna:** Arkitektar sniðgeva, geva byggingini fokus ella mál: Hvat ætlar man at upplivaa í júst hesum ávísa bygningi? Hvat hóskar til hesa og hasa ávísu funktónina.

Arkitekturin hugsar um rúm. Hvussu tey verða hvør sær og saman. Hvussu farleiðirnar fara at vera. Hvørjar dygdir eru á júst hesum lendinum. Hvar er besti sólargangurin, minsti vindurin og yvirhøvur best at vera?

Síðani eru krøv um trygd, um brunarkrøv og byggilógir, ið arkitekturin eisini skal taka hædd fyri og syrgja fyri eru í lagi. Arkitekturin skal tí leggja tað soleiðis til rættis, at øll fyrilit eru tikin og umhugsaði, áðrenn bygt verður.

Arkitektar skulu duga at greina tað uppgávu ella tað arbeiði, ið skal gerast. Har eru krøv frá byggiharranum og eigaranum, sum t.d. funktiónir og placering. Har eru eisini krøv til hvussu brúkarin ella ánarin ætlar at innrætta seg. Haraftrat er fíggjarkarmurin og tíðarætlanin at taka hædd fyri. Hvat slag av bygningi er talan um? Hvat skal hann brúkast til? Hvørjar eru uppgávurnar, sum skulu loysast, áðrenn bygningurin virkar sum hann skal? Hvørjir facilitetir og rúm skulu vera í bygninginum?

Fyri at skilja korini fyri tí bygningi hann skal byggja, fer arkitekturin út og hyggur at staðnum, har byggjast skal. Arkitekturin kannar hvørjir møguleikar eru á staðnum. Hvussu landslagi rundan um er, og hvussu bygdalagið er. Eru grannar? Eru fyrilit sum skulu takast í hesum sambandi? Er byggisamtykt fyri staðið?

Arbeiði frá fyrstu arkitektaskitsuni til bygningurin stendur liðugur, er nógv og drúgt. Tá ymisku krøvini til byggingina eru útgreinað, kemur arkitekturin við einum samanhangandi uppskoti um, hvussu bygningurin skal sniðgevast, og hvussu tilfar og detaljurnar í bygninginum skulu vera. Arbeitt verður síðani við hugskotinum í tekning 2D og 3D og modellum soleiðis, at til ber at meta um, hvussu og hvat skal gerast. í Hesum arbeiðinum samstarvar arkitekturin við ymiskum ráðgevum. Ráðgevarnir eru verkfrøðingar, byggifrøðingar og hándverkarar, sum duga at ráðgeva um byggitilfar, konstruktión og tøkni.

**4. Nær hevur ein tørv á arkitektum?**

**Meduna:** Tað er tørvur á arkitekti, tá ein hevur ætlanir um, og fer I holt við at byggja og sniðgeva td. ein bygning, og tá farið verður at leggja ætlanir fyri býir, vegir og landsløg.

Tað er altíð hent at hava ein aftrat sær, sum hevur roynt hetta áður, og sum dagliga hugsar og arbeiður við hesum evnum. Ein fakpersón, ið hevur kunnleika og yvirlit yvir, hvat krevst til uppgávuna, og hvussu farið verður fram.

## SPURNINGAR KNÝTTIR AT TEMANUM:

**1. Hvat er burðardygd?**

**Meduna:** Burðardygd er í stuttum, tá eitthvørt ber seg. Burðardygd er tá umhvørvið, tað sosiala og tað fíggjarliga ber seg og gongur upp í eina stórri eind.

Bygging er umhvørvisliga burðardygg, tá ein hevur gingið brúkaratørvinum á møti, soleiðis at umhvørvið uttan um okkum ikki verður slitið, so komandi ættarliðini ikki fáa nøkta sín tørv.

Tørvur brúkarans er tað funktionella, tað tekniska, tað estetiska og tey krøv umhvørvið setur, og eisini tað, ein væntar sær av og til byggingina.

Burðardygdersjónarhorn, har ein sær, ella tekur støðu út frá fíggjarligum, sosialum, estetiskum og vistfrøðiligum atliti. Fokus er á at leggja sivilisatiónina og menniskjasligan aktivitet soleiðis til rættis, at tørvurin at menna seg og spenna seg út í samfelagnum, og tá tørvurin hjá borgararnum verður nøktaður. Alt hetta, samstundis sum "biodiversiteturin" og økoskipanin verður uppihildin. Ætlanin er, at ætlan og handling skulu arbeiða eftir burðardyggum leisti í framtíðini. Burðardygd snýr seg tí um alt frá einstaka, lokala bygdarlagnum til alla verðina.

**2. Hvat er siðvenja?**

**Meduna:** Siðvenja er afturvendandi tiltøk, sum verða endurtikin og upp-afturtikin umaftur og umaftur, frá ættarliði til ættarlið, ár erftir ári.

**3. Hvat er tøkni?**

**Meduna:** Ítøkilig tøkni kann t.d. vera mekanikkur, streymur og verkfrøðisuppgávur innan orkuútvinning, umhvørvi, tilfar og biogass. Tøkni kann eisini vera ein framferðarháttur; hvussu man ber seg at ella hvussu man byggir.

**4. Hvussu setur omanfyri í samband við arkitektur?**

**Meduna:** Burðardyggur arkitekturur er tá ein í bygningum og bygging sum heild tekur burðardyg atlit.

Tvs. tað snýr seg um at fáa so góðar burðardyggar karmar og arkitektur fyri menniskjalívinum sum til ber, við tí tilfari ein hevur at arbeiða við. VIð burðardyggum atliti í bygging og bygningum, er ætlanin at minka um umhvørvisliga ávirkanina, ta bygda umhvørvi hevur á umhvørvið. Hetta ber til við at velja rætta tilfarið, røttu orkuna, røttu rúmini og røttu góðskuna. Burðardyg sniðgeving og ætlan er tilvitað arbeiði, har ein hugsar og metir um, hvat ber seg best.

SIðvenja í arkitekturhøpi snýr seg aloftast um, hvussu ein vanliga ger/ byggir, hvussu ein er vanur at arbeiða, og hvat tilfar er best hóskandi til uppgávuna. Siðvenja er eisini afturvendandi hættir at byggja og leggja ætlanir. Harumframt er siðvenja gomul hús ella siðbundin húsabygging. Altso bygging, har man nýtir leistir og vitan, man hevur nýtt fyrr.

Í einum burðardyggum høpi, velur ein ofta ta siðvenjuna, ið er burðardyggast. Men tað kann eisini vera siðvenja at nýta nýggja vitan og óvanligt tilfar um hettar ber seg betur. Í bygging snýr tað seg ofta um at økja um bygging og ætlan.

Burðardygt tøkni í samband við bygging er eisini optimering. Um ein velur røttu tøknina, ber til at spara orku, tilfar og fígging. Burðardygt tøkni kann eisini vera at velja gólvhita heldur enn radiatorar, vindeygu, ið eru orkusparandi o.s.fr. Ein tosar tó eisini um, hvussu nógva orku man nýtir uppá at framleiða ymiskar bygningslutir.

Samanumtikið ber til at síggja hetta sum ein stóran roknskap, har arkitekturin hugsar um og tekur hædd fyri ymisku virðini, so byggingin ber seg best. Ikki bert í dag, men eisini í framtíðini.

Burðardygg bygging er vanlig bygging, har góðskan er hugsa inn í eina stórri heild til frama fyri brúkaranum, teimum sum fíggja og til frama fyri umhvørvið. Góðskan er um estetikk, teknik, funktión og umhvørvi.

Hví er efturspurningur eftir burðardyggari bygging? Samfelagið sum heild og brúkarar hugsa meira og meira um hvussu sunt bygdað umhvørvi er. Her hugsar man t.d. um arbeiðsumhvørvið og inniklima. T.d. klára fyritøkur seg betri í kappingini við góðum og sunnum arbeiðshølum. Umhvørvisliga góðskan ger seg eisini galdandi fyri virði, og fyri prísin at byggja. Byggir man sjálvur fyri fyrstu ferð eru vandin fyri, at man fær minni fyri krónurnar størri, enn um man fær ein fakpersón at hjálpa sær, sum hevur roynt tað áður, og av hesi orsøk veit meira um evni.

Meirvirðið sum burðardygg bygging gevur, er eitt meirvirði í húsunum og er t.d. tað, at eigarin fær meir og betri fyri krónurnar, og eisini betri prís um hann selur tey.

Bygging, nýbygging, rakstur og viðlíkahald er umleið 50% av samlaðu orkunýtsluni í samfelagnum. Her er tí nógv at vinna fyri øll.